# Skúlaárið 2022—23

Listaleypurin

Soleiðis virkar Listaleypurin 4
Saman um tekningina 8
Skapa út frá tí, ið longu er skapt... 10
Filmverkstova 12
Myndprýðing og bókbinding 14
Lær at gera punk 16
Evna tína egnu standmynd 18
Sagnir og Ævintýr 20
Kópakonan í nýggjum hami 22
Farvæl harra Muffin 24
Tann troytti maðurin 26
Sigrið í hólmgongu við kontrabassin 28
Látandi tónalag 30
Ljóð á pappíri – Sinklars vísa 32
Skaldaslam 34
Orðagandur 36
HeartBeat 38



# Vælkomin til Listaleypin...

Listaleypurin er aftur á tremur við spennandi framførslum, dagsverkstovum og longri verkstovum. Fyri skúlaárið 2022/23 eru 16 tilboð á skránni.

Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni www.listaleypurin.fo. Her finna tit tilfar um hvørja einstaka verkætlan, sum hevur sín egna bredda á heimasíðuni. Eisini finna tit tekningarskjalið á síðuni. Freistin at melda til er 15. septembur 2022.

Við bestu ynskjum um eitt gott skúlaár og eitt gott listaleypaár 2022-23.

## Soleiðis virkar listaleypurin...

→ Hvørt skúlaár verður ein faldari við listatilboðum sendur skúlunum í øllum luttakandi kommunum.

→ Forskúlar og skúlar kunnu bíleggja listafólkavitjan við at fylla teldutøkt tekningarskjal út á www.listaleypurin.fo

→ Verkætlanarleiðarin samskipar skúlavitjanina í samráð við skúlar og listafólk. Listaleypurin roynir eftir førimuni at ganga øllum ynskjum á møti.

→ Eftir vitjanina verður eftirmetingarskjal sent kontaktlæraranum, ið hevur ábyrgd av, at tað verður útfylt.



## Vit mæla til...

→ At næmingarnir eru við til at velja listavitjanir til skúlan. Hetta kann gerast við umboðum úr næmingaráðnum, ella við at flokkarnir stovna eitt listaráð og velja sær umboð at velja listavitjanir saman við lærarunum.

→ At næmingaumboðini taka ímóti listafólkunum og vísa teimum runt á skúlanum saman við kontaktlæraranum.

→ At lærarar gera listavitjanina til ein part av námsætlanini.

## Krøv til luttakandi skúlar...

→ At skúlin tekur væl ímóti listafólkunum og vísir teimum, hvar tey skulu vera.

→ At skúlin sær til, at listafólkini fáa ta hjálp, teimum tørvar, so sum at bera inn, seta upp, taka niður o.a.

→ At skúlin tryggjar sær, at hann lýkur krøvini til høli og tøkni fyri listavitjanina.

→ At lærarin fyrireikar næmingarnar til listavitjanina soleiðis, at øll fáa sum mest burtur úr vitjanini.

→ At lærarin hevur ábyrgd av næmingunum og er til staðar, meðan listavitjanin er.



## Freist fyri tilmelding...

Freistin fyri tilmelding er 15. septembur 2022. Eftir hetta verður skráin løgd fyri árið.

Skúlarnir gjalda onki fyri vitjanina. Norðurlandahúsið, Uttanríkis- og Mentamálaráðið og kommunurnar bera allan kostnaðin.

Tilmeldingin fer fram á www.listaleypurin.fo

# Saman um tekningina

FO

*Barbara Hilduberg*

Nœmingarnir fáa grundleggjandi undirvísing í klassiskari tekning. Tilgongdin er løtt, og dentur verður lagdur á samanhald og felagsskap. Nœmingarnir fara tekniskt til verka – á stuttligan og øðrvísi hátt. Ferðin er stór, og nœmingarnir fáa kunnleika um nógvar ymsar teknihættir.







**Navn á verkætlanini:** Saman um tekningina
**Listafólk:** Barbara Hilduberg
**Listagrein:** Myndlist
**Slag:** Verksmiðja
**Longd:** 3 skúlatímar
**Tíðarskeið:** 5. okt., 12. okt., 19. okt., 26. okt. ella 2. nov. 2022
**Málbólkur:** 4. – 10. flokkur
**Nœmingatal:** Í minsta lagi 4 og mesta lagi 30
**Høliskrøv:** Vanlig skúlastova ella evningstova (onnur størri høli eru eisini hóskandi)
**Krøv til tøkni og útgerð:** Vit brúka dygdarpappír, litblýantar og vanligar blýantar

# Skapa út frá tí, ið longu er skapt

FO

*Edith Mørkøre*

Vit arbeiða við monotypuprenti. Vit leita eftir íblástri og lutum bæði innan- og uttandura á øki skúlans. Síðani nýta vit hesar lutir til prentarbeiði, og soleiðis skapa víðari út frá tí, ið longu er skapt. Næmingarnir arbeiða sjálvstøðugt við egnum verkum og saman um stórt felags verk. Vit enda verkstovuna við at arbeiða saman um at samskipa eina áhugaverda framsýning á skúlanum.

**Navn á verkætlanini:** Skapa út frá tí, ið longu er skapt …
**Listafólk:** Edith Mørkøre
**Listagrein:** Myndlist
**Slag:** Verksmiðja
**Longd:** 4 skúlatímar
**Tíðarskeið:** 24. - 28. okt 2022
**Málbólkur:** 4. – 7. flokkur
Næmingatal: 6 – 18 næmingar
**Høliskrøv:** Handverk og list-stovurnar eru væl egnaðar. Gott borðpláss til hvønn næming at arbeiða á. Vøsk skulu vera nærhendis, so lætt er at reinsa amboð og plátur.
**Veggjapláss til framsýning:** Uml. 1 m2 fyri hvønn luttakandi næming.
**Krøv til tøkni og útgerð:** Pappír, snórar, klemmur og lærarityggigummi til at heingja framsýningina upp við. Viðmerkið í tilmeldingini um skúlin eigur svertur, valsar, pressuamboð og plátir.








# Filmverkstova

NO

*Suðurnorski filmmobilurin*

Næmingarnir gera sínar egnu stuttfilmar við vegleiðing frá serkønum filmskaparum, sum eru vanir at undirvísa børnum í filmsframleiðslu. Við okkum hava vit ein kassa av teldlum, og vit skipa fyri at skapa eitt trygt, sosialt og skapandi umhvørvi, har øll sleppa at royna at gera ein film.

Undir serkønari leiðslu av undirvísarunum skulu næmingarnir nýta teldlarnar til bæði upptøku og klipping av filminum. Tøknin er so einføld, at ein og hvør kann vera við. Vit enda verkstovuna við at arbeiða saman um at samskipa eina áhugaverda framsýning á skúlanum.








**Navn á verkætlanini:** Filmverkstova
**Listafólk:** Tveir filmskaparar úr suðurnorska filmmobilinum
**Listagrein:** Filmur – myndlist
**Slag:** Verkstova
**Longd:** 5 tímar (1 skúladagur)
**Tíðarskeið:** 31. okt. - 4. nov. 2022
**Aldursbólkur:** 4. - 10. flokkur
**Næmingatal:** Ein flokkur
**Høliskrøv:** Vanlig floksstova
**Krøv til tøkni og útgerð:** stikkkontaktir og í minsta lagi ein lærara, sum er til staðar. Suðurnorska filmmobilinum veitir alla neyðugu útgerðina, harímillum teldlar, løðarar og macbooks, sum verða nýttar til at sýna sjónfíluna “Hvat er filmur?” og til at sýna endaligu filmarnar.

Um skúlin ynskir eitt eintak av lidnu filmunum, sum verða framleiddir á teirra skúla, skal skúlin veita ein harðdisk ella ein geyma, sum vit kunnu goyma filmarnar á, tá ið skúladagurin er av.

# Myndprýðing og bókbinding

FO

*Lena Nicolajsen*

Vilt tú vita meira um bókbinding og Zine culture? Kom og lær teg at seyma tínar egnu bøkur og hoyr um Zine culture. Í hesari verksmiðjuni fara vit bæði at myndprýða og gera okkara egna bókling við 8 síðum.

Verksmiðjan gevur næmingunum møguleikan at skapa og skilja, hvussu bøkur eru gjørdar, bæði í mun til innihald og skap. Undir serkønari leiðslu av undirvísarunum skulu næmingarnir nýta teldlarnar til bæði upptøku og klipping av filminum. Tøknin er so einføld, at ein og hvør kann vera við. Vit enda verkstovuna við at arbeiða saman um at samskipa eina áhugaverda framsýning á skúlanum.









**Navn á verkætlanini:** Myndprýðing og bókbinding
**Listafólk:** Lena Nicolajsen
**Listagrein:** Myndprýðing og bókbinding
**Slag:** Longri verkætlan (4 dagar á 4 ymiskum skúlum)
**Longd:** 3 skúlatímar og 4 dagar á hvørjum skúla
**Tíðarskeið:** Nov. 2022
**Málbólkur:** 0. - 10. flokkur
**Næmingatal:** Ein flokkur (24 næmingar)
**Høliskrøv:** Borð til allar næmingarnar at arbeiða á, A3 pappír og eina kopimaskinu til taks og gjarna eitt stað, har vit kunnu framsýna bøkurnar aftaná
**Krøv til tøkni og útgerð:** Eina kopimaskinu

# Lær at gera punk

FO

*Fríði Djurhuus og Sigmund V.P. Zachariassen*

Næmingarnir fara at læra um punksøguna, og hvat punk snýr seg um. Næmingarnir verða lærdir at syngja og spæla punk, hvussu mann rópar, og hvussu mann rokkar út.

Næmingarnir læra at seta orð á sínar kenslur og at skriva tekstir og tónleik. Síðan verða teir koyrdir í bólkar, sum skriva sítt egna lag og læra at gera tað skjótt. So verður lagið vant og framført fyri hinum.

**Navn á verksmiðjuni:** Lær at gera punk
**Listafólk:** Fríði Djurhuus og Sigmund V.P. Zachariassen
**Listagrein:** Tónleikur og sangskriving
**Slag:** Longri verkætlan (3 dagar á hvørjum skúla)
**Longd:** Verksmiðjan er 3 tímar og 3 dagar á hvørjum skúla
**Tíðarskeið:** novembur 2022
**Málbólkur:** 8. – 10. flokkur
**Næmingatal:** Í mesta lagi 30
**Høliskrøv:** Vanlig tónleikastova ella skúlastova.
**Krøv til tøkni og útgerð:** 2 jack káplar og 1 xlr kápul:

Vinaliga viðmerkið um skúlin hevur gittarforsterkarar, bassforsterkarar, trummusett, sanganlegg, mikrofonir, gittarar ella bassgitrarar.



# Evna tína egnu standmynd

FO

*Bjørg Djurhuus og Rannvá Djurhuus Carlsson*

8.00–8.50
Dagurin byrjar við at stimbra hugflog næminganna við myndum av kendum standmyndum, sagnum, tónleiki og práti um serligar sjóverur sum marmenlar, nykar og kópakonur.

9.00–10.30
Tá ið næmingarnir hava sæð og fingið greitt frá, hvussu standmyndirnar verða uppbygdar við bonsaitráði og ostavoksi, fara næmingarnir undir at evna egnar standmyndir við støði í dagsins uppleggi.

10.40–11.30
Eftir at næmingarnir hava evnað sína egnu standmynd, verða næmingarnir samlaðir og skulu nú stutt seta orð á arbeiðsgongdina og geva standmyndini navn. At enda verða standmyndirnar vístar fram á einum hóskandi stað í skúlanum.





**Navn á verkætlanini:** Evna tína egnu standmynd
**Listafólk:** Bjørg Djurhuus og Rannvá Djurhuus Carlsson
**Listagrein:** Myndlist
**Slag:** Verksmiðja
**Longd:** Verksmiðjan er frá 8 til 11.30
**Tíðarskeið:** 14. – 18. okt. 2022
**Málbólkur:** 0. - 10. flokkur
**Næmingatal:** Ein skúlaflokkur (24)
**Høliskrøv:** Ljóst & rúmligt
**Krøv til tøkni og útgerð:** Flatskermur

# Sagnir & Ævintýr

*Mariann Hansen & Hettarher*

FO

Mariann Hansen fer saman við tónleikabólkinum Hettarher, at endurgeva søgur frá okkara forfedrum í nýggjum hami. Vit lata oyruni upp og nýta hugflogið, ferðast 100 ár aftur í tíðina og inn í ein ævintýraheim, har nógvar hugsandi verur livdu í Føroyum.

**Navn á framførsluni:** Sagnir & Ævintýr
**Listafólk:** Mariann Hansen & Hettarher
**Listagrein:** Sjónleik, frásøgn, bókmentir, tónleik
**Slag:** Framførsla
**Longd:** 30 - 40 min.
**Tíðarskeið:** 21. - 25. nov. 2022
**Málbólkur:** 4. – 10. flokkur
**Næmingatal:** Einki mark
**Høliskrøv:** Tað størsta felagshølið, ið skúlin hevur at bjóða (t.d. ein fimleikahøll ella annað felagshøli). Hølið skal helst kunna myrkaleggjast (er ikki krav)
**Krøv til tøkni og útgerð:** Atgongd til streym



# Kópakonan í nýggjum hami

FO

*EKA trio og Birita Poulsen*

Kópakonan í nýggjum hami er ein framførsla, ið sameinir tónleik, frásøgn og myndlist. Næmingarnir fara at uppliva søgnina um Kópakonuna á heilt nýggjan hátt — við tónleiki eftir Páll Sólstein, sum EKA trio spælir og Birita Poulsen syngur og sigur frá við myndum hjá Edwardi Fuglø.

**Navn á framførsluni:** Kópakonan í nýggjum hami
**Listafólk:** Kristina Thede Johansen, Ernst Dánjalsson Remmel, Aksel Dánjalsson Remmel og Birita Poulsen
**Listagrein:** Tónleikur, frásøgn og myndlist
**Slag:** Framførsla
**Longd:** Framførslan er 30 – 35 min.
**Tíðarskeið:** 9. - 13. januar 2023
**Málbólkur:** 4. – 7. flokkur
**Næmingatal:** Í mesta lagi 200
**Høliskrøv:** Størri høli so sum aula ella fimleikahøll
**Krøv til tøkni og útgerð:** Gott hevði verið, um skúlar høvdu uppvørpu og klaver

Roykmaskina er partur av framførsluni – vit hava hana sjálvi við. Kanska er neyðugt hjá skúlum at sløkkja roykalarmarnar áðrenn framførsluna.





# Farvæl harra Muffin

DK

*De Røde Heste*

Farvæl harra Muffin er ein lívsjáttandi og hjartanemandi frásøgn um at siga farvæl. Við hita, gamanslyndi og virðing verður søgan fortald um síðstu dagarnar í lívinum hjá einum nógv elskaðum marsvíni. Men harra Muffin hevur livað eitt gott lív, og kanska er deyðin einki at vera bangin fyri. Ein dukkusjónleikur um stóru evnini, sum viðvíkja øllum. Lívið og deyðan.

**Navn á framførsluni:** Farvæl harra Muffin
**Leikarar:** Claus Mandøe, Else Anker-Møller
**Listagrein:** Dukkusjónleikur
**Slag:** Leiksýning
**Longd:** 40 minuttir
**Tíðarskeið:** 13. -16. feb. 2023
**Málbólkur:** 2. - 3. flokkur
**Næmingatal:** Í mesta lagi 80 næmingar.
**Høliskrøv:** 6,5 x 9 x 2,9 metrar høgt. Hølið skal kunna myrkaleggjast. Vit hava alt við, eisini áskoðarauppbygging til 80 næmingar. Okkum tørvar eina hjálpandi hond til at bera inn, tá ið vit koma, og tá ið vit eru liðug.
**Krøv til tøkni og útgerð:** Okkum tørvar vanlig streymstikk





# Tann troytti maðurin

NO

*Jo Strømgren Kompani*

Tann troytti maðurin er ein lívligur sjónleikur, ið nýtir eyðkenni frá gomlum teknifilmum og stummfilmum. Gjøgnum livandi kropsmál, leikandi pall- og ljóðmyndir og hugtakandi tónleik miðlar leikurin eina søgu, sum er bæði stuttlig og snild.

Jo Strømgren Kompani leggur dent á at stimbra hugasambond. Við at lýsa støður á pallinum, ið kunnu tykjast at hava lítið upp á seg við fyrsta eygnabragd, vekir leiksýningin hugasambond til støður í gerandislívinum hjá teimum ungu.

**Navn framførsluni:** Tann troytti maðurin
**Listabólkur:** Jo Strømgren Kompani
**Listagrein:** Leiklist
**Slag:** Leiksýning og verkstova
**Longd:** Leiksýningin varir í umleið 40 minuttir. Verkstova 30 min.
Vit hava eisini prát við børnini aftan á sýningina, har tey kunnu seta sjónleikaranum spurningar (15 min.)
**Tíðarskeið:** 13. - 17. februar 2023
**Aldursbólkur:** 0. - 7. flokk
**Næmingatal:** Í mesta lagi 120
**Høliskrøv:** Minsta støddin á leikhølinum er 8,5m x 5m x 3m (hædd). Myrkalegging, um møguligt.
**Krøv til tøkni og útgerð:** Ljóðanlegg





# Sigrið í hólmgongu við kontrabassin

FO

*Teir fýra bassistarnir*

Teir fýra bassistarnir framføra og fortelja søguna um talentfullu gentuna Sigrið og hennara stríð við tann stóra kontrabassin. Á leiðini fer hon í hólmgongu við tango, rockabilly, neo-klassiskt, fólkatónleik og jazz, áðrenn hon finnur sína egnu leið.

Næmingarnir sleppa bæði at vera við í framførsluni og at spæla á hetta bergtakandi ljóðførið.

**Navn á framførsluni:** Sigrið í hólmgongu við kontrabassin
**Tónleikarar:** Torbjørn Torleiksson Mortensen, Sigrið F. Hansen, Svend Torleik Mortensen og Agnar Lamhauge
**Listagrein:** Tónleikur og sjónleikur
**Slag:** Framførsla
**Longd:** 30 - 40 min.
**Tíðarskeið:** 20. - 24. feb. 2023
**Málbólkur:** 0. – 7. flokkur
**Næmingatal:** Óavmarkað
**Høliskrøv:** Onki
**Krøv til tøkni og útgerð:** Onki





# Látandi tónaløg

*Woodpeckers Recorder Quartet*

DK IRL NO SE

Teir fýra blokkfloytusnillingarnir í Woodpeckers hava eina spennandi, koreograferaða framførslu av blokkfloytutónlist, ið fevnir um 600 ár – frá 15. til 21. øld. Gjøgnum framførsluna fáa ungu áhoyrararnir høvi at hoyra og síggja nógv ymisk sløg av blokkfloytum heilt tætt við, og eftir framførsluna sita áhoyrararnir eftir við einari kenslu av bæði íblástri og forvitni.

**Navn á framførsluni:** Látandi tónaløg
**Listafólk:** fýra tónleikarar úr bólkinum Woodpeckers Recorder Quartet
**Listagrein:** Tónlist
**Slag:** Framførsla
**Longd:** Longd á framførslu: 35 minuttir (+15 minuttir til framløgu um ljóðførini og til møguliga spurnaløtu)
**Tíðarskeið:** 27. feb. - 3. mars 2023
**Aldursbólkur:** 0. - 7. flokkur
**Næmingatal:** í mesta lagi 80
**Høliskrøv:** Fimleikahøll, bókasavn ella ein stór skúlastova. Okkum dámar best at hava eitt tríkantað øki at flyta okkum runt á, og at næmingarnir sita á gólvinum, bonkum og/ella stólum á tveimum síðum av tríkantaða økinum.
**Krøv til tøkni og útgerð:** 4 stólar. Ongi onnur teknisk krøv.



# Ljóð á pappíri: Sinklars vísa

NO

*Kultivator*

Hvussu ljóðar ein søga, og hvussu sær eitt lag út? Í hesari verkstovuni arbeiða næmingarnir við at gera ljóðeffektir og animatiónir úr pappírsklippi til eitt sjónlag um Sinklars vísu.

Sinklars vísa er ein dramatisk søga, full av spenningi. Men hvussu skapar tú ljóð og myndir til ein tekst? Í hesari verkstovuni samstarva næmingarnir um at gera eitt heilt sjónlag við hjálp av einføldum tólum.





**Navn á verkstovuni:** Ljóð á pappíri: Sinklars vísa
**Listafólk:** Vegar Vårdal og Mette Vårdal
**Listagrein:** Tónleikur og filmur
**Slag:** Verkstova
**Longd:** 3 tímar
**Tíðarskeið:** 27. feb. - 3. mars 2023
**Aldursbólkur:** 4. - 7. flokkur
**Næmingatal:** Í mesta lagi 20
**Høliskrøv:** Tað eru tvær verkstovur í senn: Onnur verkstovan hevur brúk fyri arbeiðsplássi til at gera pappírsklipp og animatiónir. Ein vanlig skúlastova er passalig. Næmingarnir skulu brúka saksar, lím og blýantar.
Hin verkstovan fer útum at gera ljóðupptøkur, um viðrar. Um ikki, verður verkstovan innandura, og so hava vit brúk fyri einari skúlastovu.
**Krøv til tøkni og útgerð:** Okkum tørvar minst ein lærara til hvønn bólk.

# Skaldaslam

*Lasse Thorning Jæger*

Næmingarnir skulu dystast við orðum. Teir skulu skriva yrkingar og framføra tær so hugfangandi, at skaldskapurin fer at runga í veggjunum restina av skúlaárinum.

Við at næmingarnir sjálvir fáa høvi at royna seg við skapandi skaldskapi, snýr undirvísingin seg um at kveikja teirra áhuga fyri at arbeiða við orðum, ljóðum og merkingum.

*Mynd: Emma Slebsager Nielsen*




FO DK



**Navn á verkstovuni:** SKALDASLAM
**Listafólk:** Lasse Thorning Jæger
**Listagrein:** Bókmentir og skaldskaparlist
**Slag:** Longri verkætlan (4 dagar á 4 ymiskum skúlum)
**Longd:** 3 - 6 tímar. Mánadag til hósdag á sama skúla. At enda verður skipað fyri einum "skúla-slam", tá ið 10 - 15 næmingar dystast framman fyri hvørjum øðrum – ella fyri øllum skúlanum, um teir vilja.
**Tíðarskeið:** Februar og mars 2023
**Málbólkur:** 4. - 10. flokkur
**Næmingatal:** Undirvísingin er ætlað 10 - 30 næmingum
**Høliskrøv:** Ein skúlastova (ella líknandi) í ein heilan dag. Minst ein tíma í einum fyrilestrasali við mikrofon og hátalara
**Krøv til tøkni og útgerð:** Uppvørpa og telda við internetsambandi í skúlastovuni. Ein mikrofon. Eitt lítið PA-anlegg ella líknandi. Pappír – bæði blonk og við linjum. Blýantar/kúlupennar

# Orðagandur

FO

*Silvurdrongur, Trygvi Danielsen*

Næmingarnir uppliva eina rúnabindandi framførslu við orðasangi, sum gevur teimum íblástur at skriva egnar tekstir – og harafturat høvi at seta íblásturin í verk.

Eg vil geva teimum íblástur og prógva fyri teimum, hvussu ríkt, stórt og flótandi føroyska málið er. Síðan vil eg geva teimum skrivivenjingar, sum eru sniðgivnar at vísa næmingunum, at tey duga.

**Navn á verkætlanini:** Orðagandur
**Listafólk:** Trygvi Danielsen
**Listagrein:** Skaldskapur, tónleikur, hipphoppur
**Slag:** Framførsla við verksmiðju
**Longd:** Framførslan er 20 – 30 min., verkstovan er 2 – 3 skúlatímar
**Tíðarskeið:** 7. - 11. mars 2023
**Málbólkur:** 8. – 10. flokkur
Næmingatal: Minst 10, mest 30.
**Høliskrøv:** So intimt sum gjørligt, vanlig høli við sitiplássi til hvønn næming
**Krøv til tøkni og útgerð:** Eingi krøv. Bert ein framførsla uttan mikrofon og ein skriviverkstova við penni og pappíri.



# HeartBeat

DK

*HeartBeat Group*

Í framførslubólkinum HeartBeat Group eru tríggir rokaligir tónleikarar, sum eru fullir av spæligleði. Teir geva áskoðarunum eina fjølbroytta konsertuppliving, sum fær eldhugan at kóka yvir. Framkomnar rytmur verða leikandi lætt bornar fram, meðan pallurin verður fyltur við sangi, rappi, sjónleiki og stomp.

Við hjartahita og skálkabrosi strálar HeartBeat Group langt út um leikpallin og trøllabindur børnini, sum verða boðin at taka lut í framførsluni við sangi, klappum og bodybeatum. Fyri hvørt trummuslag – hvørt hjartaslag – breiða smílini seg.

**Navn á verkætlanini:** HeartBeat
**Listafólk:** tríggir tónleikarar úr bólkinum HeartBeat Group
**Listagrein:** Stomp tónleikur
**Slag:** Sýning og verkstova
Eftir sýningina kunnu vit bjóða eina verkstovu á 30 min. fyri einum skúlaflokki
**Longd:** Sýningin varir í umleið 45 minuttir.
**Tíðarskeið:** 27. - 30. mars 2023
**Aldursbólkur:** 0. - 10. flokkur
**Næmingatal:** Í mesta lagi 200
**Høliskrøv:** Vit hava tørv á einari gólvvídd (uttan gólvteppi), ið er 6 x 6 x 3,5 metrar høg.
**Krøv til tøkni og útgerð:** Okkum tørvar vanlig streymstikk





Freistin fyri tilmelding er
15. septembur 2022.

Fá meira at vita á
www.listaleypurin.fo

Umsitingin hjá Listaleypinum:

R.C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
tlf. + 298 210125
listaleypurin@listaleypurin.fo

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Kommunufelagið
LISA
Norðurlandahúsið í Føroyum